## Góð ráð til avvarðandi

Bati tekur tíð

Ver tolin við hann/hana og bíða til hann/hon batnar

Lat hann/hana kenna tín stuðul

Orða teg skilliga, róliga og jaliga

Gev pláss fyri hvørjum øðrum

Lat teg ikki taka av fótum

Lat gerandisdagin hava greiðar reglur og mørk

Halt á við tínum gerandisdegi, so vítt gjørligt

Søk tær vitan um sjúkuna

Fá hann/hana at søkja sær hjálp, um tú leggur til merkis ávaringartekin ella afturstig

Tosa við onnur avvarðandi í somu støðu, um tú hevur brúk fyri tí



***Avvarðanditoymið, desember 2014***

Landssjúkrahúsið

# Kunning til avvarðandi P40




Landssjúkrahúsið

## Vælkomin á Psykiatriska depilin

Endamálið við faldarinum er at upplýsa um ymisk viðurskifti, sum kunnu verða viðkomandi við innleggjan á Psykiatriska deplinum. Á Psykiatriska deplinum verður dentur lagdur á gott samskifti við avvarðandi. Faldarin er eitt ískoyti til tað kunning ið starvsfólkini á eindini annars veita. Avvarðandi eru vælkomin at spyrja um ivamál stinga seg upp.

## Psykiatriski depilin

Psykiatriski depilin hevur sum sína meginuppgávu at tryggja, at landsins borgarar fáa eitt dygdargott røktar- og viðgerðartilboð. Á Psykiatriska deplinum er ambulant virksemi, økispsykiatri og innleggjan á P40.

Ambulant virksemi er til børn, ung og vaksin og umfatar útgreining, viðgerð, heilivágsviðgerð, samtalur, bólkaviðgerð av ymsum slagi, fysio - og ergoterapeutiska viðgerð, og undirvísing fyri sjúklingar og avvarðandi.



## P40

P40 er ein eind á Psykiatriska deplinum. P40 er býtt í trý:

- PAM: Akut psykiatrisk móttøka
- PA: Almenn psykiatri
- PI: Intensiv psykiatri

Eindin er einasta av sínum slag í landinum, og tekur ímóti øllum sjúklingum, ið hava tørv á psykiatriskari viðgerð og røkt. Eindin hevur 19 pláss.

Á P40 starvast fleiri yrkisbólkar: sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar og pleygarar. Onnur fakfólk arbeiða eisini á deplinum: læknar, psykologar, sosialráðgevi, fysioterapeutar, ergoterapeutar, musikterapeutur, umboð fyri avvarðandi og reingerðingsfólk.

Á eindini verður arbeitt í toymum. Hvør sjúklingur er knýttur at einum toymið. Dentur verður lagdur á eitt skipað og málrættað samskifti millum sjúkling, starvsfólk og avvarðandi.

## Prestur

Prestur er knýttur at Psykiatriska deplinum. Um sjúklingar ella avvarðandi hava tørv á at tosa við prest ella annan samkomuleiðara, verður hjálpt við hesum.

## WWW

## Hentar heimasíður

Www.bedrepsykiatri.dk

Www.sind.dk

Www.psykiatrifonden.dk

Www.tabu.dk

Www.levemedskizofreni.dk

Www.spiseforstyrrelser.dk

Www.depressionsforeningen.dk

Www.borderlineforeningen.dk

Www.adhd.dk

Www.autisme.dk

## Trygd

Av trygdarávum eru ávís viðurskifti galdandi fyri sjúklingarnar á eindini. Tað er ikki loyvt at hava egnan heilivág, hvassar ella spískar lutir og lutir úr glasi við inn á eindina.

## At fara av eindini

Við atliti til viðgerðina eru sjúklingar til staðar á eindini við innleggjan. Um ynskt verður at fara av eindini, verður hetta avtalað við starvsfólkini. Tað kann verða neyðugt, av viðgerðarávum, at avmarka møguleikarnar at fara av eindini. Sjúklingarnir verða bidnir um at boða frá, tá ið tey koma og fara . Úthurðin verður stongd kl. 22.00.

Skipað verður regluliga fyri undirvísing fyri avvarðandi






## Undirvísing til avvarðandi

Á Psykiatriska deplinum verður skipað fyri undirvísing til avvarðandi um sálarsjúkur. Undirvíst verður í: psykosu og skizofreni, depressjón og persónleikaólag. Faldarin “Undirvísing til avvarðandi” er til taks á eindini.

## Umboð fyri avvarðandi

Sum liður í at betra um umstøðurnar hjá teim avvarðandi, millum annað við at stuðla og ráðgeva, er umboð fyri avvarðandi á deplinum. Maria Andreassen Hentze kann hittast við at skriva ein teldupost til lsmarhe@ls.fo ella á telefon 304500 lokal 4422 ella 234561.

Landssjúkrahúsið

## Vitjanartíðir

Á P40 er vitjanartíð kl. 15.00-17.00 og 19.00-21.00.

Vitjandi verða vinarliga biðin um at venda sær til eitt av starvsfólkunum, tá ið tit koma á eindina, sum vísa tykkum til eitt vitjunarrúm.

Um yngri børn hjá innløgdum koma at vitja, kunnu ávís rúm í Ergoterapiini nýtast, har ymsar leikur eru til børn.  Ergoterapiin er í kjallarinum á P40.

## Fyrispurningar

Vaktarskifti og frágreiðingar um sjúklingar á eindini er kl. 07.00-07.30, kl. 15.00-15.30 og kl. 23.00-23.30. Uttan fyri hesar tíðir eru avvarðandi vælkomin at spyrja til sjúklingin.

Starvsfólk á Psykiatriska deplinum bera samleikakort; hetta so at sjúklingar og avvarðandi vita, hvønn tey samskifta við. Samleikakortið upplýsir navn, starvsheiti og depilin, starvsfólkið starvast á.



## Tagnarskylda

Øll starvsfólk hava tagnaðarskyldu.

Við innleggjan verður sjúklingurin biðin um at fylla út “Váttan um samtykki”, har viðkomandi játtar samskifti við avvarðandi og aðrar viðkomandi stovnar. Í ávísum førum ynskir sjúklingur ikki, at avvarðandi og stovnar verða kunnað um støðuna. Starvsfólkið stuðlar sjúklinginum til samstarv.

Avvarðandi verða boðin til samrøðu, har endamálið er, at tey fáa kunning um sálarsjúkur og verða sædd, hoyrd og rúmað. Avvarðandi hava  royndir og vitan um støðuna, ið hava týdning í røkt og viðgerð. Avvarðandi kunnu vísa okkum á lívsviðurskifti, áhugamál og eginleikar hjá sjúklinginum, ið geva eina betri heildarfatan.

## Máltíðir

Morgunmatur kl.08.00

Døgurði kl.11.30

Drekka: kl.14.00

Nátturði : kl.17.30

Kaffi : kl.20.00



Matarhøllin er opin frá kl. 11.30-13.00

Sølubúð og sjálvtøkur eru í forhøllini (á Landssjúkrahúsinum). Sølubúðin er opin gerandisdagar kl. 8.00 – 20.00, og í vikuskiftinum kl. 14.30-20.00.

Til ber at keypa sær døgurða ella okkurt lætt til matna.

## Telefon

Avvarðandi kunnu tosa við starvsfólk á deildini við at ringja á telefon 304500 og biðja um lokal 4440, 4441 ella 4445.

## Mynttelefon

Telefon: 320748



## Fartelefon og fartelda

Sjúklingar brúka sína egnu fartelefon og farteldu á eindini. Yvirlæknin kann tó í serligum førum verða noyddur at avmarka atgongdina til telefon og teldu hjá onkrum sjúklingi, um mett verður, at sjúklingurin harvið er betri vardur. Fartelefonin má undir ongum umstøðum brúkast til myndatøku.

Atgongd er til internet á eindini.

## Virðislutir/peningur

Frárátt verður sjúklingum at hava við sær størri peningarupphæddir ella virðislutir við innleggjan. Psykiatriski depilin tekur ikki ábyrgd av møguligum missi ella skaða.

## Royking og opin eldur

Psykiatriski depilin er roykfrítt umráði, undantikið PI, sum hevur eitt rúm har sjúklingar kunnu roykja.

Av trygdarávum verður opin eldur, kertuljós, bikarljós ella líknandi ikki nýtt á deplinum.

## Rúsevnir

Tað er hvørki loyvt at hava rúsdrekka ella rúsevni við sær inn á eindirnar ella verða ávirkaður av hesum.

## Tvingsil

Onkuntíð er neyðugt at taka avgerðir og handla ímóti sjúklingsins vilja. Sjúklingurin kann til dømis verða til vanda fyri seg sjálvan og/ella onnur.

## Klaga

Um sjúklingur metir seg verða skeivt viðgjørdan ella viðfarnan og ætlar at klaga, verður viðkomandi hjálptur við hesum.